# kall Cup 2008

## HB bjóðar øllum dreingjum og gentum at gera lið til innandurakapping í fótbólti, í høllini á Hálsi í døgunum 1.- 2. februar.

| Aldursbólkar | Føðiár |
|---|---|
| Gentur 8-10 | 98-99-00 |
| Gentur 10-12 | 96-97 |
| Smágentur 12-14 | 94-95 |
| Gentur 14-17 | 91-92-93 |
| Pinkulingar | 00-01 |
| Smápiltar | 98-99 |
| Piltar | 96-97 |
| Smádreingir | 94-95 |
| Dreingir | 92-93 |

Seinasta freist at melda seg til er **mikudagin 30. januar kl. 20.00.**

**Tilmelding hjá:**
Oddmar Andreasen
Tel 310760 / 585300
Jesper B. Nielsen
Tel 556005

Á hvørjum liði eru 5 leikarar. Í deildunum gentur 14-17 og dreingir eru bert 4 leikarar. Loyvt er at hava ein skiftisleikara. Luttøkugjaldið er 200 kr. fyri hvørt liðið. Liðini skulu hava fótbóltsnøvn. 3 tey fremstu liðini í hvørjum aldursbólki fáa heiðursmerki.

# Havnar Bóltfelag

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# ÚTBJÓÐING

Vegna Fuglafjarðar kommunu verður arbeiðið í samband við útstykking Vestur í Bø í Fuglafirði boðin út í almannari útbjóðing.

Arbeiðið umfatar, gerð av umleið 250 metrar av útstykkingarvegi, við tilhoyrandi kloakk og vatnleiðingsarbeiði.

Lisitatiónin verður í Býráðshúsinum í Fuglafirði tann 19. februar 2008 kl. 11.00, og kunnu teir í boðið hava verða hjástaddir.

Útbjóðingartilfar kann bíleggjast hjá Fuglafjarðar kommunu, tlf. 737700, teldupostur patur@fuglafjordur.fo, móti veðhaldi kr. 7.000,- sum verður at gjalda inn á konto í Føroya Banka nr. 6460 2205965.

*Fuglafjørður 24-01-2008*

# Lastbilførari

Søkt verður eftir lastbilførara at byrja beinanvegin

## IR Lastvognar

Tlf. 58 11 26

# EYSTUROYAR APOTEK

## Farmakonomur

Eysturoyar Apotek søkir eftir farmakonomi, til avloysarastarv, frá 1. apríl 2008 til 1. sept. 2008

**Vit vænta:**
- At tær dámar at avgreiða viðskiftafólki
- At tú ert álítandi og arbeiðsom
- At tú hevur góð samarbeiðsevni
- At tú arbeiðir sjálvstøðugt

**Vit bjóða:**
- Gott arbeiðsumhvørvi
- Góðar starvsfelagar
- Fjølbroytt arbeiði
- Fulltíðarstarv

Løn eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og farmakonomfelagið.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2008

Meiri fæst at vita, við at ringja til apotekið á tlf: 471200 og spyrja eftir Hjalta Gunnarstein, apotekera (hjalti@apotek.fo) ella Marjan Nielsen, leiðandi farmakonomi

Skrivlig umsókn saman við Farmakonomprógvi, CV og møguligum ummælum skulu sendast til:

**Eysturoyar Apotek**
Mýravegur 6
620 Runavík

# Skrivari

## til Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu

Søkt verður eftir skrivara, hálva tíð at byrja skjótast til ber.

Vit søkja ein virkisfúsan persón, sum kann taka sær av vanligum skrivarauppgávum, men sum eisini kann arbeiða sjálvstøðugt, við m.a. projektstýring og samskifti við útlendskar granskingarstovnar.

Tað, sum vit kunnu bjóða, er eitt arbeiðspláss við nógvum avbjóðingum og skiftandi uppgávum.

**Vit leggja dent á, at umsøkjarin hevur:**
- viðkomandi útbúgving
- góðan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt mál
- góðan kunnleika til arbeiði við teldum
- kunnleika til bókhaldsskipan landsins
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- lætt við at samskifta og er fleksibul

**Uppgávurnar eru:**
- ymiskar skrivarauppgávur, t.d. at skriva eftir diktafon
- roknskapar- og fyrisitingarligar uppgávur
- viðlíkahald av bóka- og greinasavni
- journalisering/arkivering
- fyrireiking av fyrisitingarligum málum til støðutakan
- sjálvstøðugt samskifti úteftir, bæði munnliga og skrivliga, á føroyskum, donskum og enskum

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu er deild innan sjúkrahúsverkið. Arbeiðsuppgávurnar hjá deildini eru at kanna einstaklingar fyri sjúku ella mein av arbeiðsávum, at meta um arbeiðsførleika, serliga í samband við fyritíðarpensjón, endurbúgving og yrkisráðgeving, at ráðgeva Arbeiðseftirlitinum og Skipasýninum í arbeiðsmedisinskum spurningum, at skipa fyri sjúkufyribyrgjandi arbeiði og at fremja granskingarvirksemi innan arbeiðs- og almannaheilsu.

Deildin hevur, síðan hon varð sett á stovn í 1988, skipað fyri ymiskum granskingarvirksemi innan bæði arbeiðslæknafrøði og fólkaheilsu. Hetta virksemi, sum hevur verið í neyvum samstarvi við starvsfelagar í Evropa, USA og Asia, er fíggjað við peningi frá almennum í Føroyum, USA, ES og Danmark. Ein megintáttur í granskingini er, hvussu dálkingin av heimshøvunum ávirkar heilsuna hjá føroyskum børnum – og nú eisini hjá vaksnum fólki. Á deildini starvast í løtuni 15 fólk.

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. nr. 316696, tosa við Elsu Olsen, skrivara, ella Pál Weihe, yvirlækna.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skal sendast til:

Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Sjúkrahúsverk Føroya, Sigmundargøta 5, Postsmoga 14, FO-110 Tórshavn ella við telduposti til dfaa@health.fo í seinasta lagi 15. feb. kl. 12.00.

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
Sjúkrahúsverk Føroya
Sigmundargøta 5 · Postsmoga 14 · FO-110 Tórshavn
Tlf.: +298 31 66 96 · Fax: +298 31 97 08,
www.health.fo · dfaa@health.fo